

*Fremsti dreymurin hjá mær sum rithøvunda er framvegis at kunna lata eina kenslu í ein so flottan skaldsligan búna, at hon aldrin hvørvur aftur, sigur Jóanes Nielsen*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Í tí løtuni, tú byrjar at hyggja at tær sjálvum við eygunum hjá øðrum, hevur tú gjørt títt lív til eitt helviti**

– Eg hevði heldur enn fegin býtt minst 20 av teimum árunum um við at sloppið at arbeitt sum rithøvundur burturav. Sjálvt um hesi árini hava givið mær eitt dýrabært innlit í korini hjá arbeiðarastættini, so eru tey eisini orsøkin til, at alt ov lítið er komið burturúr hjá mær sum rithøvundur.

Tí hóvar tað honum eisini væl, at hann nú 'í prinsippinum er deyður' og ikki nýtist at jagstra nýggjar upplivingar longur, men umsíðir kann savna seg um at skriva.

Eitt skálkabros sníkir seg fram í eygunum á gamla provokatørinum

– Seinnu árini havi eg havt eina spann hangandi uttanfyri vindeyga, sum starvslønir og arvur so deiliga javnan eru dryppað niður í. So fyri fyrstu ferð í lívinum eru pengar ikki ein stórur trupulleiki. Eg havi eisini ovmikið at tilfari at bryggja søgur úr her á loftskamarinum í glæmuni frá sigarettini og telduni í nøkur ár afturat, sigur Jóanes Nielsen.

Hann trýstir grønu Cecil'ina niður í øskubikarið og hyggur eitt sindur loyndarfullur upp aftur

– Tíbetur eru onki mark enn fyri, hvat tú kanst droyma innanfyri lúnningina.

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*